Olaf Olsen á NAFF:

# NAFF tekur seg væl út á Hjalla

**– Eg skilji væl, at stigtakararnir til North Atlantic Fish Fair valdu at hava framsýningina undir einum taki á Sandvíkahjalla. Tað hevði sína »sjarmu«, tá ið framsýningin var í Saltangará, tí her er nógv vinnuvirksemi, men tað er avgjørt ein fyrimunur fyri dygdina, at øll framsýningin nú er undir einum taki, sigur Olaf Olsen, sum vitjaði á NAFF týsdagin**



*– Tað er altíð ein serstakur dámur yvir eini altjóða framsýning. Nógv ymiskt er at síggja, og tú møtir eisini fólki, sum tú hevur hug at práta við. Jú, eg haldi, at North Atlantic Fish Fair avgjørt er verd eina vitjan, sigur Olaf Olsen, vinnulívsmaður*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

NAFF
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Olaf Olsen, vinnulívsmaður, er væl nøgdur við umstøðurnar, sum North Atlantic Fish Fair hevur í stóra bygninginum hjá Poul Mohr á Sandvíkahjalla.

– Jú, tað er avgjørt ein fyrimunur, at øll framsýningin er undir einum taki. Hetta gevur nakrar møguleikar, sum ikki eru teir somu, tá ið ein stórur partur av framsýningini fer fram í tjøldum. Havandi í huga, at hetta – sum eg havi skilt – er ein nógv bíligari loysn fyri fyrireikararnar, enn tað var at leiga tjøldini, skilji eg væl, at teir valdu hesa loysnina, sigur Olaf Olsen, sum saman við konu síni, Honnu, var á NAFF einar 2-3 tímar týsdagin.

Hann heldur, at tað hevði sína »sjarmu«, tá ið NAFF varð hildin á økinum hjá Runavíkar havn, har nógv vinnuvirksemi er, og haraftrat setti tað ein serstakan dám á tiltakið, at Norrøna lá við bryggjuna sum hotelskip.

– Men her hava fyrireikararnir vigað fyrimunir og vansar og hava so valt at flyta framsýningina í stóra bygningin á Sandvíkahjalla, ið er væl engaður til hetta endamálið.

### Áhugaverd framsýning

Hóast Olaf Olsen og konan, Hanna, vóru á framsýningini eina fitta løtu hendan dagin, komu tey ikki runt um alla høllina og til allar framsýnararnar, sum eru við.

– Nei, vit komu ikki runt. Nú kenni eg nógv fólk, so nógv varð prátað á vegnum. Jú, eg haldi, at framsýningin er áhugaverd og saktans kann samanberast við tær vælskipaðu stevnurnar av slíkum slagi her um okkara leiðir.

Olaf heldur ikki, at hann á ferð síni á framsýningini sá nakað soleiðis kollveltandi nýtt, men talan er í fleiri førum um ymiskar betringar av tólum og maskinum til vinnuna á sjógvi og landi.

– Tað er altíð áhugavert at vitja á eini fiskivinnuframsýning – ikki minst hjá okkum, sum fáast við vinnuvirksemi.

Olaf heldur tó, at ein slík framsýning eisini er áhugaverd hjá teimum, sum einki hava við vinnu at gera, tí her fáa fólk høvi at síggja, hvussu ein slík altjóða framsýning verður fyriskipað.

– Tað er altíð ein serstakur dámur yvir eini altjóða framsýning. Nógv ymiskt er at síggja, og tú møtir eisini fólki, sum tú hevur hug at práta við. Jú, eg haldi, at North Atlantic Fish Fair avgjørt er verd eina vitjan, sigur Olaf Olsen, sum hesa løtuna, vit hittu hann, var í fylgi við Eileri Jacobsen og konuni, Beintu.

# Vinarligasti høvuðstaður í heimi er nú komin á fløgu

**Tórshavnar Kommuna hevur nú savnað eitt hav av upplýsingum um Kommununa á eini sera hentari fløgu**

FISH FAIR 05
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*




*Tórshavnar Kommuna hevur gingið nýggjar leiðir. Her er Niels Uni Dam frá kommununi á Fiskivinnustevnuni við fløguni við alskyns upplýsingum um Havnina*

– Ein talgild ferð ígjøgnum heimsins vinarligasta høvuðstað.

Tey spara seg ikki í Tórshavnar Kommunu, tá ið tey skulu reklamera fyri eini nýggjari fløgu, tey hava gjørt.

Hvussu vinarlig Tórhavn er, kann sjálvandi diskuterast. Men diskuterast kann tað ikki, at Tórshavnar Kommuna hevur gjørt eina sera forvitnisliga fløgu um Kommununa.

– Hetta er ein ætlan, sum vit hava arbeitt við í eini tvey ár, sigur Niels Uni Dam á kommununi, sum er ein av teimum, sum hevur arbeitt við fløgunum.

Hann sigur, at á fløguni eru savnaðir eitt hav av upplýsingum um Kommununa og hesir uplýsingar eru bæði á føroyskum og á enskum.

Og tað er alt samalt prýtt við vøkrum myndum.

Fløgan er býtt sundur í øki, bæði landafrøðiliga og í ymisk vinnuøki.

Hann sigur á fløguni er eitt stutt, søguligt yvirlit allar bygdirnar í kommununi eins og upplýsingar um vinnulív og alt møguligt annað.

Av meiri forvitnisligum, eru eisini tvær gonguferðir í Kommununi lýstar. Ein gonguferð er frá Kongabrúnni, út á Tinganes, niðan í Viðarlundina og hann endar í listaskálanum.

Hin gonguferðin er frá Krossinum á Velbastað, niðan á Kirkjubøreyn og hon endar í Múrinum í Kirkjubø.

Fyribils er í hvussu so er ikki ætlanin, at hendan fløgan skal vera til keyps í handlinum.

– Hetta er ein fløga sum er ætlanin er at umboð fyri kommununa skulu hava við sær á uttanlandsferðum og tá ið útlendskir gestir vitja í Havn og vit skulu greiða frá um kommununa, sigur hann.

Ætlanin er eisini at virki og fyritøkur í kommununi, kunnu hava fløguna við, tá ið tey fara uttanlands ella fáa gestir og tey hava brúk fyri at greiða frá teimum umstøðum og teimum møguleikum, sum eru í Havnini.

Ein fløga er løtt at hava við og her so so allir upplýsingar um kommununa savnaðir.